**inni** - trygt og ómaksleyst til hús







## Raðhúsabygging í Svínáum

Um nóg stórur áhugi er fyri tí, verður farið undir bygging av 6 raðhúsum í Svínáum. Húsini eru 95 fermetrar í stovuhædd og 70 fermetrar í loftshædd. Harafturat er bilhús á 31 fermetrar. Grundøkið er uml. 350 fermetrar. Húsini eru sera snøgg, væl innrættað og gjørd við góðum tilfari og handverki. Húsini verða latin lyklaklár, tó uttan máling, tapetsering og gólvbelegning. Húsini eru sama snið sum húsini, ið verða bygd á Kolshjallum á Eiði. Prísur: kr. 1.350.000,00.

P/F inni • Niels Finsens Gøta 37
P.O. Box 364 • FO-110 Tórshavn
inni@inni.fo • Tlf. 35 42 00 • Fax 35 42 01

**inni**




# SKRIVSTOVUFÓLK

Søkt verður eftir skrivstovufólki til Akfaradeildina at byrja skjótast gjørligt. Talan er um eitt fast fulltíðarstarv.

**UPPGÁVAN**

Uppgávan fevnir m.a. um:

· Avgreiðslu av viðskiftafólki og telefonavgreiðslu
· Skráseting av akførum
· Avgreiðslu av skrásetingargjøldum
· Eftirstøðumál
· Kassauppgerð

**FØRLEIKAKRØV**

Vit hugsa okkum ein persón við skrivstovuútbúgving, HH ella líknandi útbúgving og arbeiðsroyndum á skrivstovu. Dentur verður lagdur á, at ein hevur góð samstarvsevni og er fyrikomandi. Kunnleiki at arbeiða við teldu er eisini ein treyt.

**SETANARTREYTIR**

Starvið er lønt eftir sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Starvsmannafelagið. Starvssetanin hoyrir undir Vinnumálaráðið við tilhoyrandi stovnum, umframt Løgmansskrivstovuna og onnur aðalráð.

Upplýsingar um starvið kunnu fáast við at venda sær til Hans Jacob Stenberg, deildarleiðara, á telefon 35 04 08. Umsókn við møguligum prógvum og viðmælum skal vera okkum í hendi í seinasta lagi **15. januar 2007**. Tey, ið longu hava søkt starvið, nýtast ikki at senda inn nýggja umsókn.

*Akstovan er stovnur undir Vinnumálaráðnum og hevur sum endamál at fremja akfaratøkniligar kanningar og akfaraeftirlit, stíla fyri koyriroyndum, útvega fólki koyrikort, umsita skráseting av koyrikortum og umsita akfaraskráseting, skrásetingargjøld og vegskatt. Umframt høvuðsdeildina í Tórshavn, hevur Akstovan sýnsdeildir um alt landið. Á Akstovuni starvast 20 fólk.*

REPROZ

AKSTOVAN

Akstovan | Hoyvíksvegur 57 | Postsmoga 3206 | FO-110 Tórshavn
Tel +298 35 04 00 | Fax +298 35 04 01 | www.akstovan.fo | akstovan@akstovan.fo

# VARÐAGØTA 79

## - 6 ARKITEKTTEKNAÐ HÚS MITT Í HAVN



Húsini eru í tveimum hæddum á 90 m², til samans 180 m². Húsini eru liðug í mai 2007. Í neðra er durur, fýrrúm, gongd, baðirúm, tvey kømur og stórt kjallarúm, ið kann innrættast. Í erva er kamar, hjúnarúm við egnum baðirúmi, wc, tvær stovur, køkur og grovkøkur. Alt er gjørt úr fyrsta floks tilfari frá a til ø, og húsini eru lyklaklár við hvítvøru, og tey eru málað uttan og innan.

Tit fáa helst eitt tað besta útsýnið yvir býin og fjørðin. Her er eisini hjallur/goymslurúm.

Við Varðagøtu eru tveir skúlar, barnagarður, vøggustova og handil.

**Fakta**

| | |
|---|---|
| Navn: | Varðagøta 79 |
| Arkitektur: | Teknistovan Magnus |
| Byggiharri: | Platform |
| Støða: | 2 x 90m² |
| Hátún: | 1 ella 2 (úr 6,7 m² til 18m²) |
| Bilpláss: | 2 |
| Hjallur: | 1 |
| Kømur: | 4 |







| | |
|---|---|
| WC: | 3 |
| Grovkøkur: | 1 |
| Køkur: | 1 |
| Stovur: | 2 |
| Longd: | 12,6m |
| Breidd: | 7,3m |

**inni** www.inni.fo

**PLATFORM** www.platform.fo